# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

planet.fo

# Bloodgroup, Fjallabræður og Valravn á G! 2009

**G! avdúkar nýggj nøvn alla vikuna og bólkarnir, ið vóru kunngjørdir í dag eru Bloodgroup, Fjallabræður og Valravn.**




Á heysti í 2007 gav Bloodgroup út debutfløguna, Sticky Situation, sum av fleiri ummælarum bleiv bólkað millum bestu útgávurnar tað árið.
Bloodgroup hava seinasta árið framført á einum endaleysum lista av festivalum kring heimin, millum annað Roskilde í Danmark, Popkomm í Týsklandi, Eurosonic í Hollandi, By: Larm í Noregi, Great Escape í Bretlandi, Iceland Airwaves í Íslandi, og nú í vár gongur leiðin SXSW í Texas USA, og í summar framførur bókurin til ársins G! Festival.

Bloodgroup byrjaði á einum køldum vetrardegi í Íslandi í 2006, tá systkinini Halez (synth), Lilja (vokal) og Raggi (synth, trummur) settu seg saman við føroyska Janus (vokal, synth, elektro trummur) at skriva elektroniskan popp.
Eftir nakrar mánaðir við sangskriving og venjing, framførdu tey eitt fangandi og orkuríkt show á Iceland Airwaves og vórðu við eitt hátíðarhildin sum eitt hitt mest spennandi nýggja navnið í Íslandi. Seinni fingu tey tveir limir afturat, DJ Benni B-Ruff (plátuspælarar, elektro trummur) og Styrmir (sampling), sum hava givið enn meira av sprutli til yvirkókandi grýtuna.

**Fjallabræður**
Fjallabræður merkir á føroyskum Fjallabrøður. Fjallabrøður er eitt rock-kór mannað við fjallalendingum av vesturfirðunum, mest bygdini Flateyri í Íslandi. Fyriskipararnir av G! 2009 siga, at meira verður at frætta um Fjallabræður seinni.

**Valravn**
Bóklurin Valravn hava røtur og arv við sær, men kenna seg ikki noydd at halda alt, sum tað var í fyrndini. Tey ganga eftir nýggjum gøtum og taka tað við, tey kunnu brúka. Antin tað er eitt elektroniskt ljóð, ein fólkavísa, ella ein reyður veitslukjóli. Musikalskir vallarar. Viðførið er millum annað ein bratsj, jødaharpur og ásláttur av ymsum slag. Og harkaliðið er úr Føroyum, Danmark, Sveis og Ecuador. Í felag hava tey áhugan fyri norðurlendska tónleikaarvinum. Løg sum "Svend í Rosengaard" og "Krummi" eru góð dømi um, hvussu Valravn dugir at handfara arvastykkini fimliga og elegant, uttan at tveita upprunaliga virðið burtur.

Anna Katrin Egilstrøð, kvin-

Frankaríki, Týskland, Sveis, Pólland, Finnland, Svøríki, Noreg, Ísland og Føroya. Sum tey vitja enn einaferð summarið 2009, tá tey fara at framføra á G!

VALRAVN eru:
Anna Katrin Egilstrøð, Føroyar
Martin Seeberg, Danmark
Søren Hammerlund, Danmark
Juan Pino, Schweiz/Ecuador
Christopher Juul, Danmark

## Fyrsta tokið í Føroyum við Múrin

**Eingin ferðsla skal inn á festival økið, og tí hava fyriskipararnar av festivalinum tikið tað stigið at leiga eitt sirkus tok til Føroya.**

**Av trygdarávum ber ikki til at taka bilin við inn á festival økið í Kirkjubø í summar, men hetta noyðist ikki at verða ein vansi. Fyriskipararnar av festivalinum hava hinvegin gjørt tað stuttligt at koyra til festival økið – teir hava nevniliga leiga eitt tok, ið skal koyra frá Gomlu Rætt til Kirkjubøar. Mark Joensen, ein av fyriskiparunum sigur við Planet, at ætlanin upprunaliga var at leiga bussar at koyra frá Gomlu Rætt, men ætlanirnar broyttist, tá ið teir fingu eitt tilboð frá einum donskum veitara, um at leiga eitt sirkus tok.**
**- Vit halda tað er festligt og øðrvísi, og so kunnu vit samstundis reypa av at hava fingið tað fyrsta tokið til Føroya, sigur Mark.**
**Ætlanin er, at tokið skal koyra aftur og fram ímillum Kirkjubø og Gomlu Rætt javnan, soleiðis at bíðitíðin verður minst møgulig.**
**- Vit mugu bara vóna at tað verður gott veður, soleiðis at tað verður møguligt at koyra við tokinum uttan at ávirkast av veðrinum. Um tað verður vátt í veðrinum, so eru nakrir vognar í tokinum, ið hava tak á, sigur Mark.**
**Enn er endaligi sáttmálin ikki undirskrivaður, men fyriskipararnar siga, at sáttmálin hóast alt er góðtikin av báðum pørtum, og at tokið undir øllum umstøðum kemur til Føroya.**

## Linda er í X-Factor finaluni

Sambært Ekstrablaðnum er Linda Andrews ein av teimum níggju luttakarunum, sum er komin víðari í finaluna.
Komandi fríggjakvøldini fara minst tvær milliónir danir at kenna hesi níggju fólkini og bólkarnar, sum er eftir av teimum 3.800, sum upprunaliga vóru við í X-Factor kappingini hjá Danmarks Radio.

Sambært Ekstrablaðnum eru tey níggju fólkini hesi:

*Tey trý hjá Thomas Blachmann eru:*
Lucas
Mohamed
Sidsel

*Tey trý hjá Linu Rafn eru:*
Claus Seest
Claus Lillelund
Linda Andrews

*Teir tríggir bólkarnir hjá Remee eru:*
Lulu Hightower
Jaykamam og Dan
Marcel, Kasper, Stephanie og Patricia.

